## Fýra daga leikbann

David Jarolim varð róptur »skitni kekki« og tók fast um testiklarnar á Bielefeld leikaranum Markus Schuler. Kekkiski David Jarolim, hjá Hamburger SV hevur fingið fýra daga leikbann, umframt eina bót, áljóðandi 10.000 euro, fyri svínskan atburð um vikuskifti, tá Bielefeld og Hamburger SV møttust í Bundesliguni. Kekkin kom at skeldast við Markus Schuler og Rudiger Kauf hjá Bielefeld, og hann tók undir Schuler. Hann fekk sjálvandi beinleiðis reytt kort fyri tilburðin. David Jarolim hevur accepterað dómin, og sigur at hann varð provokeraður til tað av teimum báðum Bielefeld leikarunum. – Teir kallaðu meg ein skitnan kekka, og eg flippaði út. Kekkin verður saknaður í uppstillingini hjá Hamburger SV, ið kempa um plássið í bestu deildini.



HB-TB 5-1 (2-0)

# Gamli klassikarin í Gundadali

**Gamli klassikarin í føroyskum fótbólti var, tá TB og HB møttust, og mangan hava áskoðararnar fingið fult virði fyri pengarnar, tá hesi sigursvandu lið hava tørnað saman gjøgnum árini**

FÓTBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Tað var ikki nógv, TB kundi gera við HB, í steypakappingardysti teirra í gjárkvøldið. HB byrjaði tó ikki so skjótt, sum man kanska kundi vænta. TB stóð væl skipað, heldur aftarliga á vøllinum, og tað kravdist tolni til, skuldi HB koma gjøgnum TB múrin, vælstýrdur av fyrrverandi landsliðskempuni Óla Johannesen.



*Christian Høgni Jacobsen var í góðum lag í gjárkvøldið, tá hann skoraði tvey mál. Avloysari hansara Henrik Rubeksen fekk somuleiðis tvey mál. so væl er statt í álopspartinum hjá HB*

### Tolni var lyklaorðið hjá HB

Júst tolni tóktist at vera lyklaorðið hjá HB í gjár, og eftir 21 minuttir bragdaði umsíður, tá ein sera væl upplagdur Christian Høgni Jacobsen vann sær tveir metrar frá markørinum, og fekk skumpað bóltin undir málverjanum, ið kom fúkandi út. Avleveringin kom frá langt afturi á vøllinum, og datt niður aftanfyri TB verjuna, har Christian Høgni hevði plasera seg.

Tá 36 minuttir vóru spældir, var sami Christian Høgni aftur á blettinum, tá hann vann ein bólt, eftir at hann tíðuliga hevði skumpað TB-verjuleikaran Pætur Holm vekk frá sær. Hvussu er og ikki, tagdi floytan hjá Jens Peturi Brattalíð, og Christian Høgni helt kósini móti málinum, við útfordrandi manér og stórum skjótleika. Komin ájavnt brotsteigarmarkið, sendir hann eitt vakurt følt skot í einum bleytum boga, a la Thierry Henry, framvið málverjanum, og inn við handastu stong, til støðuna 2-0, ið eisini gjørdist hálvleiksstøðan.

### Javnari seinni hálvleikur

Í næsta hálvleiki kom TB betur við, og serliga Dan Mortensen og Jóhan Eivind Mouritsen stóðu seg avbera væl. Tó var tað, eins og í fyrsta hálvleiki, HB, ið byrjaði betur. Fyrst skoraði Andrew av Fløtum við brotssparki í 57. minutti, og so kom Henrik Rubeksen inn fyri Christian Høgna. Henrik gjørdi bart, stutta løtu seinni, tá hesin í 71. minutti, slapp at standa leysur í TB brotsteiginum, og hevði alla tíð í heiminum, at seta pannuna á, til 4-0. TB fekk so brotsspark í 82. minutti, ið Jóhan Eivind Mouritsen tók sær trygt av. Í 87. minutti var tað so aftur Henrik Rubeksen, ið var uppá spæl, tá hann skoraði dagsins seinasta mál, og staðfesti harvið góðu byrjanina hjá HB, og sendir eitt ávaringarskot til hini liðini, um at HB er ein styrki í ár.

**HB-TB 5-1 (2-0)**
1-0: Christian Høgni Jacobsen, 21.
2-0: Christian Høgni Jacobsen, 36.
3-0: Andrew av Fløtum, 57. (br.)
4-0: Henrik Rubeksen, 71.
4-1: Jóhan Eivind Mouritsen, 82. (br.)
5-1: Henrik Rubeksen, 87.

# KÍ leitar eftir málinum

**Heldur ikki hesa ferð eydnaðist klaksvíkingum at fáa mál í Streymnesi, har heimaliðið aftur megnaði stóra úrtøku**

EB/STREYMUR-KÍ
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Steypavinnararnir í EB/Streymi hava framvegis møguleika at endurvinna kappingina um Løgmanssteypið. Talan verður kortini ikki um sama steypið, tí tað hevur B36 jú vunnið til ognar.

Í gjárkvøldið vann EB/Streymur 2-0 á KÍ. EB/Streymur tykist vera í góðari javnvág. Teir nýta somu uppstilling, og teir eru framúr effektivir frammanfyri mótstøðumálinum. KÍ legði sera varðið fyri, teir drógu ferðina niður, og í 1. Hálvleiki høvdu teir púrt einki at bjóða uppá fram eftir vøllinum. Eftir steðgin vóru klaksvíkingar meiri ágrýtnir og framrættaðir.

Nógvir av áskoðarunum úr Klaksvík vóru ikki komnir framat vøllinum, tá ið støðan longu var 1-0. Hans Pauli Samuelsen sendi innfyri eitt sindur úr høgru, og Leif Niclasen var leysur við handara stólpan. Sigurin varð staðfestur, tá ið tað restaðu fýra minuttir. Tá hevði EB/Streymur í góða løtu verið undirmannað. Dómarin, Ransin Djurhuus, vísti miðvallaranum, Bárði Olsen, reyða kortið, eftir at hesin hevði roynt at steðga Leon Bjartalíð, sum hesa ferð var á høgra vongverja hjá KÍ.

2-0 málið skoraði Hans Pauli Samuelsen eftir snarálop. Klaksvíkingar mistu á veg í álop, og Hans Pauli var tryggur, tá ið hann kom ímóti landsliðsmálverjanum. Harvið var tað greitt, at EB/Streymur verður partur av hálvfinaluni somuleiðis, sum tað frammanundan varð roknað við.

KÍ hevur innan tríggjar dagar spælt tvær ferðir 90 minuttir í Sreymnesi uttan, at tað hevur eydnast at fáa bóltin inn um stinna René Tórgarð í EB/Streyma málinum. At skjóta mál er tískil stórur trupulleiki hjá klaksvíkingum. Egil á Bø, Marni Djurhuus og hinir í heimaverjuni eru stinnir, og teir duga væl at lesa spælið, men KÍ hevur spælt seg til møguleikar, sum ivaleyst kundu havt borið mál við sær, um atteir høvdu havt álopsvápnini, sum EB/Streymur eigur.

Gongdin higartil hevur víst, at KÍ eigur ikki sovorðin tung vápn. Hesa ferð var Heðin á Lakjuni fremstur, og Rodrigo, sum er keyptur til Klaksvíkar at gera mál, var aftanfyri. Teir høvdu báðir onkran møguleika, uttan at tað eydnaðist.

Sum 2. hálvleikur leið spenti Eyðun Klakstein álopsbogan. Ovi Nysted varð fluttur úr miðverjuni og fram í álopið, og so vóru Leon Bjartalíð og Símun Joensen, sum hesa ferð røktu vongverjarnar, í verjuni saman við Milic Curcic, ið tykist vera góður stýrimaður. Tað stóust spentar støður í heima brotsteiginum, men KÍ kom ikki nærri enn nær við og næstan. Spenningurin var kortini stórur, um tað skuldi eydnast KÍ at stríða seg til longda leiktíð. Málið hjá Hans Paula Samuelsen var mønustingurin, sum bar stóra heimafagnað og enn eitt vónbrot fyri klaksvíkingar við sær.